## Koyra 15.000 til hús

Japanska flogfelagið Japan Airlines er sera illa fyri fíggjarliga, og í einari roynd at sleppa undan gjaldssteðgi og húsagangi hevur felagið gjørt av at siga 15.000 fólkum úr starvi. Tað svarar til 30 prosent av øllum starvsfólkinum. Japanska tíðindastovan Kyodo skrivar, at tey, sum verða verandi í arbeiði, noyðast at góðtaka, at lønin minkar, og at tey missa ymsar ágóðar. Samstundis fer felagið at selja fleiri av sínum dótturfeløgum. Krepputiltøkini eru lið í einari bjargingarætlan, sum japanska stjórnin hevur lagt fyri at bjarga Japan Airlines undan at fara av knóranum.



## Kanna politikarar

Í meiri enn eitt hálvt ár hevur grønlendska løgreglan kannað eina skuldseting ímóti fýra politikarum í flokkinum Siumut, sum vórðu lagdir undir at hava misbrúkt almennar pengar. Enn er einki úrslit komið, og ein talsmaður fyri løgregluna dugir ikki at siga KNR, nær kanningarnar verða liðnar. Millum teirra, sum vórðu lagdir undir at hava misbrúkt almennar pengar, eru fyrrverandi landsstýrisformenninir Jonathan Motzfeldt og Hans Enoksen. Grønlendska løgreglan kannar eisini politikaran Alequ Hammond, sum er løgd undir at hava brotið tagnarskylduna í sambandi við nevndararbeiði.




*Tá ið Norröna kom á Havnina í morgun, fóru fólk frá Skipaeftirlitinum borð at kanna, hví tað hendi eitt óhapp í einum ketli leygardagin*

# Brendist illa umborð á Norrönu

**Maskinmaðurin, sum brendi seg umborð á Norrönu leygardagin seinnapartin, skal liggja einar tvær vikur á Ríkissjúkrahúsinum**

ÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tá ið Norröna kom á Havnina í morgin, fóru fólk frá Skipaeftirlitinum og frá politinum umborð at leita eftir orsøkini til óhappið, sum hendi í einum ketli umborð leygardagin seinnapartin.

Norröna var júst farin úr Esbjerg, tá ið ein maskinmaðurin fór at reinsa ein ketil. Tað hendi ett óhapp, og hann brendist illa.

Petur Holm, stjóri á Smyril-Line sigur, at teir av manningini, sum beinanvegin komu til mannin, gjørdu eitt gott arbeiði undir leiðslu av stýrimanninum. Teir køldu mannin niður.

Samstundis vórðu boð send eftir hjálp, og ein tyrla hjá donsku sjóverjuni kom eftir manninum og fleyg hann á brunadeildina á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Í dag sigur Petur Holm, at maðurin er ikki so illa farin, sum tey bóru ótta fyri í fyrstani. Sum hann hevur skilt tað, hevur maðurin 3. gradsbrenning onkrastaðni á kroppinum og annars 1. og 2. grads brenning.

Maðurin, sum er í miðal árum, verður liggjandi á Ríkissjúkrahúsinum í 10-14 dagar.

Tá ið slík óhapp henda, skal Skipaeftirlitið hava boð, og Smyril-Line boðaði eisini beinanvegin Skipaeftirlitinum frá. Er nakað í vegin umborð, verður brekið sjálvandi rættað, sigur Petur Holm.

Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri á Skipaeftirlitinum, kundi í morgun siga nakað um, nær Skipaeftirlitið er liðugt við sínar kanningar.

Petur Holm upplýsir annars, at teir tólv menninir, sum vóru um skadda mannin eftir óhappi, fingu tilboð um at fara í land í morgun at tosa við sálarfrøðing. Tað kundi verið, at onkur hevði fingið onkran trega av tilburðinum.

# Eldur í bili við Streymin

**Maðurin í bilinum, sum eldur kom í leygarkvøldið sunnan fyri brúnna um Streymin, fekk ongan skaða**

ÓHAPP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin*

Stutt eftir klokkan 19 leygarkvøldið kom eldur í ein bil beint sunnanfyri brúnna við Streymin.

Ein einsamallur maður var í bilinum, sum var á veg norðureftir. Komin niðan gjøgnum brekkuna við Streymnes, og gott 150 metrar frá sjálvari brúnni, fór at rúka undan motorhjálminum, og tað festi í bilin.

Bilurin var ein lítil lastvognur, fýra-fimm ára gamal.

Maðurin steðgaði bilinum, leyp út og sendi boð eftir Sunda Sløkkiliði gjøgnum alarmsentralin.

Eldurin varð skjótt sløktur, tá menn hava verið til tøkir at leypa avstað, og sløkkiliðsstøðin er beint hinumegin brúnna við Streymin. Sostatt var sera stutt at fara út við brandbilinum, og fingu teir tamt eldinum eftir eini heilt lítla løtu.

Hvør orsøkin til eldin er, er ilt at gita um, men brandfólk á staðnum hildu, at tað kundi verið fest í eina slangu við pumpuna, tá tann síðan, har pumpan situr, sá út til at verða brunnin fyrst.

Eingin fólkaskaði var í samband við hendingina, og maðurin rósti sløkkiliðinum fyri at vera so skjótir á staðnum.



*Óhappið hendi stutt frá næstum sløkkiliðsstøð, og sløkkiliðið var har beinanvegin*
*Mynd: Rógvi Nybo*